FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# Gerðabók í sambandi við býráðsfund nr. 7/2021

**Dagfesting:** 01.07.2021 kl. 19:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, David Andreasen, Edva Jacobsen, Magni Jøkladal, Eivin Breiðaskarð og Ólavur Larsen.

Tiltakslimir: Lillian Jacobsen og Niels Midjord, sum møttu fyri ávíkavist Sonna á Horni og Gudny Vang, sum høvdu forfall til fundin.

Ikki møtt: Sonni á Horni og Gudny Vang

Onnur:

Býráðsskrivari: Henrik Weihe Joensen, kommunustjóri

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| 26/21 | 20/00466-177 | Eldrasambýlið Vesturstova - umrøða status við arbeiðinum og avbjóðingar í hesum sambandi |
| 27/21 | 21/00231-9 | Bassi Haraldsen - Umsókn um loyvi at byggja uppí sethúsini |
| 28/21 | 21/00347-4 | Odd Eliasen - broytan av byggisamtykt til sethúsasbygging 2019 Arkivmál 19/00180 |
| 29/21 | 21/00235-80 | Vitjan av H. H. Drotningini í Fuglafjarðar kommunu 16. juli 2021 - umbøn um eykajáttan |
| 30/21 | 21/00403-5 | Lillian Jacobsen og Niels Midjord innkallaði sum tiltakslimir í sambandi við býráðsfundin tann 1. juli 2021 kl. 19:00 samsvarandi § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini. |
| 31/21 | 20/00510-4 | Skipan av ídnaðarøki á Kambsdali - uppskot frá borgarstjóranum |
| 32/21 | 21/00199-9 | Alment útboð av lendinum á matriklunum 769b og 882b, Úti á Land, Fuglafjørður |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

26/21

## 20/00466-177 Eldrasambýlið Vesturstova - umrøða status við arbeiðinum og avbjóðingar í hesum sambandi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.01.2021 | 1/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 6/21 |
| 3 Tekniska nevnd | 23.06.2021 | 62/21 |
| 4 Fíggjarnevndin | 24.06.2021 | 31/21 |
| 5 Býráðið | 01.07.2021 | 26/21 |

## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini |
|---|---|
| Stutt lýsing | Eldrasambýlið Vesturstova í Fuglairði verður útbygt. Tíðarætlanin fyri liðugtgerð av arbeiðinum er í løtuni 1. mai í ár. Settar eru 2. mió. kr. av til útbyggingina á fíggjarætlanina fyri 2021. Mett verður, at sum nú er halda tíðar- og kostnaðarætlan.<br><br>Nú er komin tann avbjóðingin inn í útbyggingina, at leiðslan í Vesturstovu hevur ynski um at fáa loyftslyftir ísettar bygningin til at lætta um arbeiðsumstøðurnar í sambandi við búfólk, sum eru illa fyri likamliga. Loftslyftir vóru ikki við í upprunaligu projekteringini, ei heldur køkur, sum leiðslan eisini ynskir at fáa útbygdan.<br><br>Arbeiðið vði at fáa ísett loftslyftur er ígongd. Kommunan fíggjar skinnarar á loftinum ímeðan sjálv loftslyftan fer av rakstrinum hjá Nánd. Mett verður, at hvør skinnari kostar 20. tús. kr. pr. Rúm. Talan er um 8 búrúm. Møgulia er ikki neyðugt, at gera øll rúm liðug við loftslyft í ár, men at nakrar lyftir verða gjørdar komandi ár.<br><br>Borgarstjórin ynskir at umrøða status og tær avbjóðingar, sum eru í arbeiðinum.<br><br>**Framhald 15. februar 2021**<br><br>Sosiala nevnd viðgjørdi málið á fundi 8. februar í ár, og tekur nevndin undir við, at arbeitt verður við at fáa ísett loftslyftu-skinnarar í 7 búrúm á Vesturstovu til ein kostnað á kr. 400.400,- uttan motorar og segl. Sosiala nevnd mælir fíggjarnevndini til at taka undir við hesum.<br><br>Fígging er tøk í løtuni til arbeiðið við at fáa ísett loftslyftu-skinnarnarnar, men tað kann koma upp á tal seinni ár, at biðja um eina eykajáttan í sambandi við arbeiðið. |

| | |
|---|---|
| | **Ískoyti til fundin í teknisku nevnd 23. juni 2021**<br>Uppgávan hjá byggifrøðinginum var at fáa til vega fýra búrúm afturat til Vesturstovu frá 12 til 16 búpláss.<br><br>**Staðfestingar og forkanningar hjá teknisku deild**<br>Tá tað koma fleiri búeindir inn, krevur tað meira almen økir so sum stovur og líknandi.<br>Húsið hevði onki starvsfólkarúm. Tey hildu hvílu inni í køkinum.<br>Tað var ein heilt lítil skrivstova við endan á gongini, sum lág sera langt burtur frá og burturgoymd, har heilivágur var goymdur inni.<br><br>**Prosjektið endaði við at innihalda hettar**<br>17 búrúm við egnum wc, eitt búrúm við wc úti á gongini.<br>Nú er starvsfólkarúm, eitt heilivágsrúm og ein nýggj skrivstova, sum alt liggur miðskeiðis í húsinum, nýggj sjónvarpsstova við góðum útsýni og borðstovan er blivin størri.<br>Í kjallaranum er havastova við útgongd til terassur, veitsluhøli við plássi til 40 fólk til borðs til føðingardagar og líknandi, við egnari úthurð, tøkni/húsavarð við egnari úthurð, skolirúm/goymsla/reingerð. Her kunnu tey sjálvi taka sær av at skolda bekkenar, sum í dag verður gjørt í aðrari kommunu.<br><br>**Fíggjarlig viðurskifti**<br>Tekniska deild hevur gjørt eina endaliga fíggjarliga uppgerð av arbeiðnum í sambandi við útbygging av Vesturstovu.<br>Víst verður til fíggjarskjal<br>Í sambandi við útbyggingina, so eru fleiri óvæntaði viðurskifti komin fram. Her er nøkur nevnd.<br><br>**Avsettur peningur til verkætlanina**<br>Í 2019 blivu settar av kr. 6.400.000,-. Nýtsla kr. 2.400.000,-.<br>Í 2020 blivu settar av kr. 7.600.000,-, Nýtsla kr. 4.700.000,-.<br>Í 2021 blivu settar av kr. 2.000.000,-. Nýtsla higartil kr. 3.000.000,-.<br>Samlað avseting til arbeiðið er kr. 16.000.000,-.<br>Samlað nýtsla higartil er **kr. 10.100.000,- v/6,25 % mvg**.<br><br>**Corona**<br>Ein av grundunum til, at peningur loypur av í 2019 og 2020 er Corona. Arbeiðið hevur ligið stilt í fleiri tíðarskeiðum.<br><br>Út frá tilboðum og mettum kostnaði varð mettur samlaður kostnaður **u/mvg kr. 10.780.750,-** sambært tekniska deild. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | **Mettar meirútreiðslur, sum koma afturat.**<br>**Kommunalar útreiðslur**<br>ABA-anlegg kr. 304.000,- u/mvg.<br>Lyftir kr. 170.000,- u/mvg.<br><br>**TN-Bygging**<br>Avtaluseðlar higartil kr. (11.900.- + 470.521,-)= 482.421,-.<br><br>**Elcon**<br>Avtaluseðlar higartil kr. (70.626,- + 423.319,-)= kr. 493.945,-.<br><br>**Útreiðslur til Nánd**<br>Kalliskipan kr. 250.000,- u/mvg, sum øll hoyrir til Nánd.<br>Lyftir kr. 230.000,- hoyra til Nánd.<br><br>**Niðurstøða um eykajáttan innanfyri karmin áljóðandi kr. 16.000.000,-.**<br><br>Av tí at peningur, sum er játtaður, er fallin burtur yvir ár, so metir umsitingin, at talan er ikki eykajáttan, tí vit halda fíggjarkarmin.<br><br>Tekniska deild metir, at Vesturstova hevur brúk fyri eini eykajáttan á **kr. 3.707.848,-**.<br><br>**Tíðarætlan**<br>Avhendingingardagurin er settur at 1. juli, men roknast kann við nøkrum manglum. Tvey búrúm í hjallaranum, tøknirúm og skolirúm eru ikki umfataði av hesi avhending.<br><br>**Ískoyti til fundin í fíggjarnevndini 24. juni 2021**<br>Tekniska nevnd varð kunnað um fíggjartørvin, og metir hon, at málið skal viðgerðast í býráðnum umvegis sosialu nevnd og fíggjarnevndina.<br><br>**Framhald 25. juni 2021**<br>Fíggjarnevndin umrøddi málið á fundi í gjár 24. juni, og samtykti, at mæla býráðnum til at veita eina eykajáttan á 4. mió. kr. til liðugtgerð av Vesturstovu, sum verður fíggjað av innistandandi og møguligum yvirflytingum. Avhendingardagurin er ásettur til at verða 1. juli í ár við nøkrum manglum, sum ikki verða liðug tá. |
| Bakgrund | Útbyggingin av eldrasambýlinum Vesturstova. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Arbeiðsumhvørvislógin<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>Fundarfrágreiðing og kostnaðarmeting frá Ann Fuglø, byggifrøðingi, dagfestar 20. og 29. januar 2021<br>FK j. nr. 20/00466-228 Dispositiónsroknskapur dagfestur 21. juni 2021_AF/PAP<br>FK j. nr. 20/00466-235 Innanhýsis notat_Samanumtøka um bygginina<br>FK j. nr. 20/00466-237 100_Vesturstova_Útbygging_20210621 | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Møguliga |
| | Umsitingarligar | Ja | Møguliga |
| Tilmæli | Borgarstjórin mælir til, at fíggjarnevndin umrøður málið við atliti at teimum avbjóðingum, sum eru við at íseta lyftir og møguliga dagføra køkin, sum ikki vóru við í upprunaligu projekteringini.<br><br>**Tilmæli 15. februar 2021**<br>Borgarstjórin og kommunustjórin mæla til at taka undir við tilmælinum hjá sosialu nevnd um at íverkseta arbeiðið við loftslyftu-skinnarunum fyri nevnda kostnað. | | |
| Dagf | 18. januar 2021 og 15. februar 2021 og 23. juni 2021 | | |



**Tekniska nevnd 23. juni 2021:**
Nevndin bleiv kunnað um fíggjartørvin, og metir hon, at málið skal viðgerðast í býráðnum umvegis sosialu nevnd og fíggjarnevnd.

**Fíggjarnevndin 24. juni 2021:**
Fíggjarnevndin samtykti, at mæla býráðnum til at veita eina eykajáttan á 4. mió. kr. í sambandi við liðugtgerð av eldrasambýlinum Vesturstovu, sum verður fíggjað av innistandandi og møguligum yvirflytingum. Vert er at leggja dent á, at talan er í høvuðsheitum um manglandi yvirlflyting frá undanfarnu árum og ikki um meirnýtslu.

**Býráðið 01. juli 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0) við 1. viðgerð, at játta eina eykajáttan á 4. mió. kr. til liðugtgerð av eldrasambýlinum Vesturstovu. Býráðið beindi málið víðari til 2. viðgerð.

## 27/21
## 21/00231-9 Bassi Haraldsen - Umsókn um loyvi at byggja uppí sethúsini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 23.06.2021 | 63/21 |
| 2 Býráðið | 01.07.2021 | 27/21 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. |
|---|---|
| Stutt lýsing | Eigarin av matr. nr. 503n hevur latið umsókn inn til kommununa um loyvi til at byggja uppí sethúsini móti grannamarkinum fyri vestan, matr. nr. 503v, Fuglafjørður.<br>Tá bygt verður nærri marki enn 2,5 m, so er neyðugt at hoyra grannarnar, sum kunnu verða ávirkaðir av bygginini.<br>Sambært byggisamtyktini, so kann loyvi gevast við treytum, harímillum, at grannaváttan er hjáløgd umsóknini.<br>Grannin fyri vestan hevur givið grannaváttan til byggingina, og ein hoyring hevur verið við grannarnar fyri norðan, eigararnar av matr. nr. 503u, 503g og 503u, Fuglafjørður, har allir hesir góðtaka byggiverkætlanina.<br><br>**Ískoyti til býráðsfundin 1. juli**<br>Í sambandi við umsóknina um byggiloyvi, hevur tekniska deild sent skriv til um søkjaran, har víst verður á, at tríggir grannar fyri norðan kunnu missa útsýni, har siktilinjur eru teknaðar á eina tekning, sum er partur av skrivinum. Víst verður til skriv, FK j. nr. 21/00231-4.<br>Við í umsóknini varð grannaváttan frá grannanum fyri vestan, men umsitingin metti tað verða neyðugt at fáa til vega tríggjar grannahoyringar afturat omanfyri vegin, av tí at tey missa nakað av útsýni.<br>Sambært byggisamtyktini, so kann loyvi gevast við treytum, harímillum, at grannaváttan er hjáløgd umsóknini. |
| Bakgrund | Víðkan av sethúsum vestureftir móti grannanum, matr. nr. 503u, Fuglafjørður. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Byggisamtyktin og BK17<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 21/00231-1 Umsókn um loyvi at byggja uppí saman við grannaváttan frá grannanum fyri vestan |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | FK j. nr. 21/00231-4 Skriv til umsøkjaran um at útvega grannaváttanir<br>FK j. nr. 21/00231-7 Grannaváttan frá Hjalti Lundsbjerg<br>FK j. nr. 21/00231-8 Grannaváttan Sámal Petur Petersen<br>FK j. nr. 21/00231-9 Grannaváttan frá Edvu og Elibert<br>FK j. nr. 21/00231-11 Byggiloyvi | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at geva byggiloyvi til leingjan av sethúsum vestureftir móti grannaognini, matr. nr. 503v, Fuglafjørður. | | |
| Dagf | 17. juni 2021. | | |



**Tekniska nevnd 23. juni 2021:**
Nevndin samtykti at fylgja tilmælinum og geva byggiloyvi.

**Býráðið 01. juli 2021:**
Edva Jacobsen segði seg vera ógegnigan í hesum máli, og luttók hon tí ikki í viðgerðini av málinum. Býráðið samtykti (8-0), at fylgja tilmælinum frá teknisku nevnd og veita byggiloyvi til Bassa Haraldsen.

## 28/21
## 21/00347-4 Odd Eliasen - broytan av byggisamtykt til sethúsasbygging 2019
## Arkivmál 19/00180

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 23.06.2021 | 54/21 |
| 2 Býráðið | 01.07.2021 | 28/21 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. |
|---|---|
| Stutt lýsing | Umsitingin hevur fingið umsókn frá eigarunum av matr.nr. 622a, 701 og 102, við áheitan um at fáa loyvi til at leggja matriklarnar í ein matrikul, og at broyta byggisamtyktina til sethúsaøki.<br><br>Matr. nr. 622a, 701 og 702 liggja í øki I, sum er fríøki.<br>Viðmerkjast skal, verandi sethús í økinum standa í øki I.<br><br>Nevndin skal taka støðu í hesum málinum, um byggisamtyktin skal broytast frá fríøki til byggiøki.<br><br>**Ískoyti til býráðsfundin 1. juli 2021**<br>Áðrenn ein slík byggisamtykt verður broytt, so má umsøkjarin koma við eini ítøkjuligari heildarætlan fyri økið. Samlaða víddin av matr. nr. 622a, 701 og 102 verður umleið 410 fermetrar. Økið liggur millum tvey økir, har sethús eru bygd á. Ein broyting í byggisamtyktini fyri eitt slíkt øki skal gerast skynsamt, soleiðis at grannar í økinum verða so lítið nervaðir sum møguligt. Her má takast atlit til hædd á einum komandi sethúsi, gólghædd í mun til verandi veg, byggistigið má gerast passandi, soleiðis at fríplass kann verða millum eini komandi sethús og grannar fyri eystan og vestan.<br>Eisini liggur økið upp at sandinum, sum er eitt viðbreki øki. Her mugu atlit takast í mun til eina broytta byggisamtykt.<br>Økið liggur við eina vegaíbinding, og tískil mugu atlit takast til atkomumøguleikar frá vegnum av.<br>Eitt uppskot til broyting í byggisamtyktini fyri eitt lokalt øki sum hetta, má liggja til almenna hoyring í tríggjar vikur, og so hava fólk møguleika fyri at koma við viðmerkingum í tríggjar vikur, tvs. at talan er um seks vikur, har almenningurin kann gera viðmerkingar til broyting í byggisamtyktini fyri økið.<br><br>**Mótmælisskriv** |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið mótmælisskriv frá eigaranum av matr. nr. 699, Mørkin 2, um at broyta fríøkið til bústaðarøki á matr. nr. 622a, 701 og 702, Fuglafjørður. Avrit av hesum mótmælisskrivi er lagt sum avrit í hetta málið. Víst verður til FK j. nr. 21/00347-6. | | |
| Bakgrund | Umbøn um at fáa broytt byggisamtyktina fyri økið, soleiðis at matriklarnir 622a, 701og 102 kunnu verða lagdir saman. | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Byggisamtyktin og BK 17<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 21/347-1 Umsókn um at fáa loyvi til at leggja matr. nr. 622a og 701 og 702 í ein matrikul og áheitan um at broyta byggisamtyktina frá fríøki til sethúsabygging<br>FK j. nr. 21/00347-6 Mótmælisskriv frá eigaranum av matr. nr. 699, Mørkin 2, Fuglafjørður | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at játta umsóknini, og at broyta byggisamtyktina frá fríøki til bústaðarøki og at málið verður lagt fyri býráðið. | | |
| Dagf | 17. juni 2021. | | |

9

**Tekniska nevnd 23. juni 2021:**
Nevndin samtykti at fylgja tilmælinum hjá tekniska leiðaranum 17. juni 2021.

**Býráðið 01. juli 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at fylgja tilmælinum frá teknisku nevnd og játta umsóknini frá Odd Eliasen um at broyta byggisamtyktina frá fríøki til bústaðarøki á matriklunum 622a, 701 og 702, Fuglafjørður.

## 29/21
## 21/00235-80 Vitjan av H. H. Drotningini í Fuglafjarðar kommunu 16. juli 2021 - umbøn um eykajáttan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.06.2021 | 33/21 |
| 2 Býráðið | 01.07.2021 | 29/21 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing | H.H. Drotningin vitjar Fuglafjarðar kommunu 16. juli 2021. Fyrireikingarnar eru ígongd og eru væl áleiðis. Játtan er ikki til fyriskipan av drotningavitjanini á fíggjarætlanini fyri 2021 Ein vegleiðandi kostnaðarmeting er gjørd og nærkast 500 tús. kr., sum biðið verður um eykajáttan til.<br><br>Ein møgulig eykajáttan verður fíggjað av innistandandi á økið 120, felagsútreiðslur kommunufyrisitingin.<br><br>**Framhald 25. juni 2021**<br>Fíggjarnevndin viðgjørdi málið í gjár 24. juni, og samtykti at mæla býráðnum til at veita eina eykajáttan á 400 tús. kr. í sambandi við fyrireiking av drotningavitjanini. Harumframt verða nakrar av útreiðslunum í sambandi við fyrireiking fíggjaðar av rakstrinum á fíggjarætlanini fyri 2021, eitt nú asfaltering. | | |
| Bakgrund | Fyriskipan av drotningavitjan | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt<br>**Kommunustýrislógin**<br>**Roknskaparverk kommunanna**<br><br>• Møgulig fylgiskjøl<br>**Yvirlit yvir útreiðslur í sambandi við vitjan av H.H. Drotningini í Fuglafirði 16. juli 2021, dagfest 23. juni 2021**<br>**Skjøl við yvirliti yvir tíðarætlan og innihald í mun til einstøku vitjanarstøðini** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Umsitingin mælir til at veita nevndu eykajáttan. | | |
| Dagf | 23. juni 2021 | | |

**Fíggjarnevndin 24. juni 2021:**
Fíggjarnevndin mælir býráðnum til at veita eina eykajáttan í sambandi við drotningavitjanina á 400 tús. kr., sum verður fíggja av innistandandi.

**Býráðið 01. juli 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini og við 1. viðgerð veita eina eykajáttan á 400 tús. kr í sambandi við drotningavitjanina. Býráðið beindi málið til 2. viðgerð.

**30/21**
**21/00403-5 Lillian Jacobsen og Niels Midjord innkallaði sum tiltakslimir í sambandi við býráðsfundin tann 1. juli 2021 kl. 19:00 samsvarandi § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 01.07.2021 | 30/21 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing | Sonni á Horni og Gudny Vang, býráðslimir, hava forfall til komandi býráðsfund 1. juli 2021 kl. 19:00. Eftir teirra ynski eru tí tiltakslimirnir Lillian Jacobsen og Niels Midjord kallaðir inn til býráðsfundin. Henda innkallan sambært § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini.<br><br>Lillian Jacobsen er fjórðvaldi limurin á lista Á við 40 atkvøðum meðan Niels Midjord er fimtvaldi limurin við 38 atkvøðum í sambandi við kommunuvalið 10. november 2020.<br><br>Býráðið skal – samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini - fyrst á fundinum 1. juli gera av, um treytirnar fyri innkallan av tiltaksliminum Lillian Jacobsen og Niels Midjord eru loknar samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini. | | |
| Bakgrund | Sonni á Horni og Gudny, býráðslimir, hava forfall til býráðsfundin 1. juli 2021 kl. 19:00. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt **Kommunustýrislógin, kapittul 3**<br><br>• Møgulig fylgiskjøl **Teldubrævasamskifti við ávíkavist Lillian Jacobsen og Niels Midjord** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |
| Tilmæli | Borgarstjórin mælir til, at Lillian Jacobsen og Niels Midjord kunnu taka sæti í Fuglafjarðar býráð í sambandi við býráðsfundin 1. juli 2021 kl. 19:00. | | |

12

| Dagf | 27. juni 2021 |
| --- | --- |

**Býráðið 01. juli 2021:**
Borgarstjórin staðfesti, at Sonna á Horni og Gudny Vang hava lógligt forfall og at valbæri er í lagi hjá tiltakslimunum Lillian Jacobsen og Niels Midjord.

13

**31/21**
**20/00510-4 Skipan av ídnaðarøki á Kambsdali - uppskot frá borgarstjóranum**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 3 Vinnu- og havnanevndin | 18.06.2021 | 23/21 |
| 4 Býráðið | 01.07.2021 | 31/21 |

Tilráðing

| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevndini. |
|---|---|
| Stutt lýsing | Borgarstjórin hevur heitt á ráðgevan «Teknistovan» Gøta um at gera eitt skipanaruppskot til innrættan av ídnaðarøki á Kambsdali. Uppskotið er í tveimum pørtum. Ovari parturin er innrættaður til smærri virkir. Økið liggur norðanfyri verandi sethúsaøkið. Økið er gjørt til sethúsaøki, so her má byggisamtyktin broytast til vinnuøki. Niðari parturin er skipaður til størri virkir, sum líkist tí virkseminum, sum er í økinum í dag.<br>Uppskotið leggur eisini upp til at gera sambindingarvegir í økinum. Atlit eru eisini tikin til tað umhvørvisliga, soleiðis at ein volli verður gjørdur framvið vegjaðaranum, sum er næmast sethúsaøkinum.<br><br>**Ískoyti 23. oktober 2020**<br>Vinnu- og havnanevndin, ið viðgjørdi málið á fundi 15. oktober í ár, ynskir hetta uppskot frá borgarstjóranum, um at skipa vinnuøki út á Kambsdali, til hoyringar hjá býráðnum.<br><br>**Ískoyti 18 juni 2021**<br>Umsitingin hevur arbeitt víðari við vinnuøkinum og gjørt til eina tillaðing, har økið norðanfyri bústaðarøki verður broytt til lætta vinnu. Hetta er grunda á ein tørv á vinnustykkjum til lættari nýtslu. Tekniska deild hevur verið á staðnum og kanna viðurskiftini nærri, og er komin til tað niðurstøðu, at grundin til, at økið er hægri enn bústaðarøki er tann, at grótfyllan liggur oman á hellu, og at lendi ikki er regulerað longur niður.<br>Sum vinnuøkið er skipað, so ber ikki til at leiga økir.<br>Mælt verður til at broyta gjaldsskránna, soleiðis at til ber at leiga vinnuøkir á Kambsdali á sama hátt sum á kaini.<br>Tekniska deild hevur gjørt uppskot um tillaðing av vegnum í økinum.<br><br>**Ískoyti til fundin í býráðnum 1. juli 2021**<br>Býráðið skal taka støðu til, um býráðið tekur undir við vinnu- og havnanevndini um at broyta sethúsaøkið norðanfyri verandi sethúsaumráði frá bústaðarøki til vinnuøki til lætta vinnu. Víst |

14

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">verður til kortútsnitt av verandi byggisamtykt, sí FK j. nr. 20/00510-12.</td></tr>
<tr><td>Bakgrund</td><td colspan="3">Uppskot frá fyrrverandi borgarstjóranum um at skipa vinnuøkið úti á Kambsdali.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt<br>Byggisamtyktin og BK 17<br>• Fylgiskjøl<br>FK j. nr. 20/00510-1 Bræv við uppskoti frá borgarstjóranum<br>FK j. nr. 20/00510-2 Kort yvir økið á Kambsdali<br>FK j. nr. 20/00510-12 Kort yvir verandi byggisamtykt fyri bústaðarøkið merkt við reyðum</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Fyrisitingin mælir til, at taka undir við uppskotinum til at broyta verandi bústaðarøki til vinnuøki norðan fyri bygt sethúsaøki.<br><br>Nýtt tilmæli til fundin 18. juni<br>Tekniski leiðarin mælir til at broyta økið norðanfyri bústaðarøkið til lættari vinnu, grundað á øktan fyrispurning um júst hetta slagi av vinnugrundøkjum, og at broyta gjaldsskránna, soleiðis at tilber at leiga/keypa vinnuøkir á Kambsdali.</td></tr>
<tr><td>Dagf</td><td colspan="3">15. oktober 2020.<br>18. juni 2021.<br>28. juni 2021.</td></tr>
</table>



**<u>Vinnu- og havnanevndin 15. oktober 2020</u>**

Nevndin mælir til at dispositiónsuppskotið til heildalætlan fyri vinnuøkið á Kambsdali verður sent býráðnum til hoyringar.

**<u>Býráðið 29. oktober 2020</u>**

Býráðið samtykti einmælt (9-0), at beina málið í teknisku deild til víðari viðgerð við atliti til møguliga at broyta byggisamtyktina fyri økið og at hava kunningarfund við íbúgvar á Kambsdali viðvíkjandi skipan av vinnuøkinum.

**Vinnu- og havnanevndin 18. juni 2021:**
Nevndin samtykti at broyta byggisamtyktina fyri vinnuøkið norðanfyri íbúðarbyggingina á Kambsdali til lættari vinnu, og at broyta gjaldsskránna soleiðis, at tilber at leiga/keypa vinnuøkir á Kambsdali, og at leggja málið fyri býráðið til støðutakan.

**Býráðið 01. juli 2021:**
David Andreasen segði seg vera ógegnigan í málinum, og tí luttók hann ikki í viðgerðini av hesum máli. 6 býráðslimir tóku undir við tilmælinum frá Vinnu- og havnanevndini, at broyta byggisamtyktina á Kambsdali til lættari vinnu. Dávur Juul, Edva Jacobsen, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal, Eivin Breiðaskarð og Niels Midjord tóku undir við tilmælinum frá Vinnu- og havnanevndini. Lillian Jacobsen og Ólavur Larsen atkvøddu ímóti. Málið tískil samtykt við atkvøðunum 6-2.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 32/21
## 21/00199-9 Alment útboð av lendinum á matriklunum 769b og 882b, Úti á Land, Fuglafjørður

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 25.05.2021 | 48/21 |
| 2 Býráðið | 09.06.2021 | 23/21 |
| 3 Býráðið | | |
| 4 Tekniska nevnd | 29.06.2021 | 71/21 |
| 5 Býráðið | 01.07.2021 | 32/21 |

### Tilráðing

| | |
|---|---|
| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. |
| Stutt lýsing | Í sambandi við íbúðarbyggingina úti á Land, hevur Fuglafjarðar kommuna fingið eina viðmerking fyri ikki at hava bjóða lendi í sambandi við íbúðarbyggingina út í alment útboð. Víst verður til málið frá Kommunala Eftirlitinum.<br>Ætlanin er at byggja íbúðarblokk nr. 2 fyrst, hetta av praktiskum áðum í sambandi við ein arbeiðsveg oman á byggiplássið. Bygningur nr. 1 verður bygdur, tá bygningur nr. 2 er liðugur.<br>Bygningur 1 er norðastur ímóti Gjógvará, og bygningur 2 er tann sunnari, har lendið hevur verið í almennum útboði.<br>Millum bygning 1 og 2 er pláss gjørt til ein millumbygning í tveimum hæddum niðanfyri veghædd.<br>Matrikulplanurin verður sostatt í trimum matriklum, har sunnasti matrikulin verður boðin út í almennum útboði, har íbúðarbygningur nr. 2 eftir ætlan skal byggjast.<br><br>**Framhald 4. juni 2021**<br>Umsitingin hevur dagført útbjóðingarskrivið saman við viðkomandi fylgiskjølum.<br>Útbjóðingarskrivið snýr seg um alment útboð av lendi, part av matr. nr. 769b, 882b, 803, 804, 772c og litra e, í alt 1672 fermetrar sambært kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn.<br>Útbjóðingartilfarið er gjørt í trá við niðurstøðuna hjá kommunala eftirlitinum í mars mánað í ár viðv. verkætlanini "Íbúðarbygging úti á Land, Toftanesvegur, Fuglafjørður".<br>Byggisamtyktin fyri økið B1 úti á Land er góðkent av býráðnum 25. mars 2021, og í løtuni til góðkenningar hjá kommunala eftirlitinum, haðani umsitingin hevur fingið at vita, at nevnda lendið kann bjóðast út til |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | almenna sølu, við tí fyrivarni, at broytingin í serstøku byggisamtyktini fyri økið B1 verður góðkent av Kommunala Eftirlitinum.<br><br>**Ískoyti til fundin í teknisku nevnd 29. juni 2021**<br>Víst verður til alment útboð av kommunalum lendi úti á Land í sambandi við eina komandi íbúðarbygging niðanfyri Toftanesvegin. Freistin at lata tilboð inn var 25 juni kl. 23.59.<br>Inn komu tvey tilboð. Eitt frá Toftanes 2 Sp/f, og eitt tilboð frá Sp/f undir stovnan v/Odd Eliasen við fleiri fuglfirðingum.<br>Umsitingin hevur gjørt eitt skjal, har báðar verkætlanirnar eru lýstar í mun til hvørja aðra, soleiðis at tekniska nevnd hevur haldgott grundarlag at taka støðu út frá, tá ein veitari av íbúðum skal veljast.<br><br>Samanumtikið eru tvær verkætlanir lýstar, sum eru ymiskar í vavi og útsjónd. Felags fyri báðar verkætlanir er, at tær fevna um 18 íbúðareindir, sum í støðd svara til 90 fermetrar. Grundstykkjavíddin er í báðum førum 1.672 fermetrar.<br><br>Í høvuðsheitum er munurin millum verkætlanirnar í tilboðunum báðum hesin:<br><br>Toftanes 2 Sp/f hevur tikið hædd fyri útbjóðingartreytunum. Her verður hugsað um vegaføringar, gongubreytir, goymsluklivar, elevatorskakt við trappu, eitt frírúm millum stuðlamúr og bygning á 3,0 m og almenna gøtu framvið sjóvarmálanum. Atkomusvalin liggur millum bygning og stuðlamúr.<br><br>Sp/f undir stovnan v/Odd Eliasen við fleiri fuglfirðingum hevur partvíst tikið hædd fyri útbjóðingartreytunum. Hædd er tikin fyri elevatori, trappum frá veghædd og niður í tún. Hjallur er á svalanum.<br>Hædd er ikki tikin fyri vegaføringum og gongubreytum, har samlaða breiddin í útbjóðingartilfarinum er 15,2 m, havandi í huga ferðslutrygdina í økinum framvið íbúðarbyggingini.<br>Hædd er ikki tikin fyri eini almennari gøtu framvið sjóvarmálanum.<br>Mátfastar tekningar mangla.<br><br>Víst verður í hesum sambandi til innkomin tilboð og skjal, sí FK j. nr. 21/00199-24, har innkomnu tilboðini og samanlíkning teirra millum eru lýst.<br><br>**Ískoyti til býráðsfundin 1. juli 2021**<br>Tekniska nevnd hevur viðgjørt málið um alment útboð av lendi úti á Land, Fuglafjørður.<br>Tekniska nevnd tók undir við tilmælinum hjá umsitingini um at taka av tilboðnum frá Toftanes og at beina málið í býráðið til endaliga støðutakan. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| Bakgrund | Útboð av kommunalum lendi í sambandi við bygging av íbúðarblokki. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Kommunustýrislógin, kunngerð um útboð av kommunalari fastogn, byggisamtyktin og BK17<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 21/00199-7 Útbjóðingartilfar, tað er útbjóðingarskriv, skriv til tilboðsgevarar, tilboðslisti og kort av lendi<br>FK j. nr. 21/00199-16 Toftanes 2 Sp/f_Tilboð uppá lendi til bústaðarbygging úti á Land í Fuglafirði<br>FK j. nr. 21/00199-17 Odd Eliasen og fleiri_Tilboð uppá lendi til bústaðarbygging úti á Land í Fuglafirði<br>FK j. nr. 21/00199-26 Toftanes 2 Sp/f_Nýtt tilboð<br>FK j. nr. 21/00199-28 Nevndarsamtykt í teknisku nevnd 29. juni 2021 |
| Viðgerð | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar / Stuttíðar / Langtíðar<br>Fíggjarligar: Ja / Ja<br>Umsitingarligar: Ja / Ja |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til, at nevndin tekur undir við útbjóðingarskrivinum, og at málið verður lagt fyri býráðið til endaliga støðutakan 27. mai 2021.<br><br>**Tilmæli 4. Juni 2021**<br>Borgarstjóri, kommunustjóri og tekniski leiðarin mæla til at býráðið góðkennir fyriliggjandi útbjóðingartilfar.<br><br>**Nýtt tilmæli til fundin 29. juni 2021**<br>Umsitingin hevur viðgjørt innkomin tilboð saman við verkætlanunum báðum, sí lýsing av tilboðum í málslýsingini og hjáløgdum skjølum.<br>Grundað á eina heildarmeting av báðum verkætlanunum, metir umsitingin, at tilboðið frá Toftanes 2 Sp/f lýkur útbjóðingartreytirnar í størri mun enn tilboðið frá Sp/f undir stovnan v/Odd Eliasen við fleiri fuglfirðingum.<br>Umsitingin mælir tí til at taka av tilboðnum frá Toftanes 2 Sp/f, ið er kr. 25.000,- hægri enn tilboðið frá Sp/f undir stovnan v/Odd Eliasen við fleiri fuglfirðingum.<br>Umsitingin grundar sítt tilmæli á hesi viðurskifti:<br>• Lúka flest allar útbjóðingartreytir, so sum:<br>o Vegaføringar |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | ○ Gongubreytir<br>○ Klivar<br>○ Almenn gøta framvið sjóvarmálanum<br>○ Mátfastar tekningar<br><br>**Nýtt tilmæli til fundin í býráðnum 1. juli 2021** |
| Dagf | 21. mai 2021.<br>04. juni 2021.<br>28. juni 2021. |

**Tekniska nevnd 25. maj 2021:**
Nevndin samtykti at taka undir við útbjóðingarskrivinum, og at málið verður at leggja fyri býráðið til endaliga støðutakan 27. mai 2021.

**Býráðið 09. juni 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevnd og góðkendi fyriliggjandi útbjóðingarskriv. 20

**Tekniska nevnd 29. juni 2021:**
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini og taka av tilboðnum frá Toftanes 2 Sp/f og at málið verður lagt fyri býráðið til endaliga avgerð.

**Býráðið 01. juli 2021:**
Býráðið samtykti, 8 fyri og 1 atkvøða blankt, at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevnd og taka av tilboðnum frá Sp/f Toftanes 2 áljóðandi kr. 2.050.000,00. Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal, Edva Jacobsen, David Andreasen, Eivin Breiðaskarð, Ólavur Larsen og Lillian Jacobsen atkvøddu fyri. Niels Midjord atkvøddi blankt.

Fundurin lokin kl. 20:45.

Gerðabókin lisin og góðkend.

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

David Andreasen

Edva Jacobsen

Magni Jøkladal

Ólavur Larsen

Eivin Breiðaskarð

Niels Midjord

Lillian Jacobsen

21